gult cyan magenta svart

Hósdagur 22. februar

SVF

18.30 Jumanji 4
19.00 Urið hjá Bernardi 4:6
19.15 Basalt (e)
19.45 Tann kinesiski múrurin
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Rættar kvinnur 2:4 – ensk dramarød
21.40 Starvsnæmingurin – tilflytarin í starvssvenjing hjá løgregluni
22.10 Krimitímin: Dalziel og Pascoe – ensk rød
22.50 DR-Dokumentar: Søgur av einari politistøð
23.50 Liðugt

EURO SPORT

07:30 Cross-country skiing
08:30 Ski jumping
10:00 Live futsal
11:30 Luge
12:00 Live cross-country skiing
13:45 All sports
14:00 Live futsal
15:30 Tennis
16:30 Live futsal
17:45 News
18:00 Xtreme sports
18:30 Olympic games
19:00 Live tennis
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »American Visions – The Wilderness and the West«
01.00 TLZ: »The Limit – Trickiest Tunnel«
01.30 TLZ: »The Limit – Largest Plane«
02.00 TLZ: »What have the 70s ever done for us?«
02.10 TLZ: »Background Brief - Time Travel for Beginners«
02.30 TLZ: »A Life of Time«
03.00 TLZ: »Healing the Whole«
03.30 TLZ: »Therapies on Trial«
04.00 TLZ: »Italianissimo – Lo Scambio di Culture«
04.15 TLZ: »Italianissimo – Punti Di Vista«
04.30 TLZ: »English Time – Get the Meaning - Gut the Gameshow«
04.50 TLZ: »Trouble at the Top – The Receivers Are Coming«
05.30 TLZ: »Starting Business English«
06.00 Bodger and Badger: »Water Laugh
06.15 Playdays: »The PlaygroundStop«
06.35 Run the Risk
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready, Steady, Cook
08.00 Style Challenge: »Myrtle and Clifford«
08.25 Change That
08.50 Going for a Song
09.30 Top of the Pops Plus
10.00 Antiques Roadshow
10.30 TLZ: »Horizon – Dinosaurs in Your Garden«
11.30 Looking Good
12.00 Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge
13.00 Doctors: »Control«
13.30 EastEnders
14.00 Change That
14.25 Going for a Song
15.00 Bodger and Badger: »Water Laugh«
15.15 Playdays: »The Playground Stop«
15.35 Run the Risk
16.00 The Really Wild Show
16.30 Top of the Pops Global
17.00 Changing Rooms
17.30 Doctors: »Second Chance«
18.00 EastEnders
18.30 Animal Hospital
19.00 Yes, Minister: »Open Government«
19.30 Keeping Up Appearances
20.00 Casualty: »Chinese Whispers«
21.00 Absolutely Fabulous: »Death«
21.30 Top of the Pops Global
22.00 Pat and Margaret
23.30 Dr. Who: »Arc of Infinity«

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 World Business Report
00.45 Asia Today
01.00 BBC News
01.30 HARDtalk
02.00 BBC News
02.30 Holiday
03.00 BBC News
03.30 Reporters
04.00 BBC News
04.30 Asia Today
04.45 World Business Report
05.00 BBC News
05.30 HARDtalk
06.00 BBC News
06.30 Waterworld
07.00 BBC News
07.30 Reporters
08.00 BBC News
08.30 HARDtalk
09.00 BBC News
09.30 Simpsons World
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk
11.00 BBC News
11.30 Holiday
12.00 BBC News
12.30 Simpsons World
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Waterworld
15.00 BBC News
15.30 Simpsons World
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.30 HARDtalk
18.00 BBC News
18.15 World Business Report
18.30 Talking Movies
19.00 BBC News
19.30 World Business Report
19.45 World Sport
20.00 BBC News
20.30 HARDtalk
21.00 BBC News
21.30 Click Online
22.00 BBC News
22.30 World Business Report
23.00 BBC News
23.30 Panorama

3 ABC

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:35 Garfield og venner
09:00 Alias Smith & Jones
10:00 Træneren
10:30 Horton-sagaen (G)
11:20 Horton-sagaen
12:10 Melrose Place - classic
13:05 Vild med dig
13:30 Panter-tanter
14:00 Mig og fremtiden
14:55 Baywatch
15:45 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 Torsdagsbio: Bigfoot og familien Henderson
21:05 TV Razzia
21:35 Action
22:05 Baren (G)
22:45 Ti tommelfingre
23:15 Vore værste år
23:45 Strømer i L.A.
00:15 Kojak
01:15 Drøm videre
01:45 Simpsons
02:10 Vore værste år (G)
02:40 Ricki Lake (G)
03:40 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Jaspur Olsen í Vestmanna lesur
07.15 Barnaløtan Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e) Jaspur Olsen í Vestmanna lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Hjá dvørgum í Niðafjøllum (e) Hans Tórgarð lesur 7. part av framhaldssøgu eftir Annfinni í Skála
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e) Suni Merkistein leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e) Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Vangamynd Annlis Bjarkhamar og Jóhannes Miðskarð leggja til rættis
17.00 Tíðindini
17.05 Í Vingarðinum Alexander Samuelsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera - hon svaraði ja Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Norðlysið! Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík.
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini "Rættur hugburður um kristindómin" EVR-sending Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevnu kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.

Vit gevast uml. middnátt

Basalt (e)

SVF Hóskvøldið kl. 19.15

Eitt øðrvísi rockstev
Bólkurin Tyr er øðrvísi. Í teirra tónleiki hoyrist ein farri av farnari tíð handan guitarljóð og trummusláttur. Tað er stevið í føroyska dansinum, sum skipar tónleikin og gevur honum eitt serligt snið. Basalt fer aftur til røturnar og prátar við Tyr.

Av Eiði til New York.
Listakvinnan Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen var í desember mánaði við á framsyning í New York saman við 4 øðrum listafólkum. Hetta er fyrstu ferð hon hevur havt framsyning uttan fyri Norðanlond, og hon vónar at hetta ikki verður seinasti túrurin, tí hon heldur tað hava stóran tydning, at listafólk leita út og syna fram aðrastaðni.

Einsamøll genta í mannfólkaverð
"Eg haldi tað er ein avbjóðing at fáast við maskinur". Hetta sigur 18 ára gamla Sigursól Bjarnfríða Jensen, ið er fyrsta genta, sum er í læru sum maskinsmiður á Tórshavnar Skipasmiðju.

Tilvera - hon svaraði ja

Hóskvøldið kl. 19.00

Á føðingardegnum hjá Hitler 20. apríl 1999 fóru tveir næmingar inn á studentaskúlan í Colorado og dróp fyri hond. Teir sóu floksfelagan, 17 ára gomlu Cassie, teir hóttu hana og spurdu, um hon trúði á Guð. Tá hon svaraði ja, flentu teir og skutu hana.

Bigfoot og Henderson familjan

– Amerikanskur filmur frá 1987



3 Hóskvøldið kl. 19.00

Familjan Henderson er ein heilt vanlig familja, sum telur fýra fólk. Pápin George, mamman Nancy og teirra tvey børn, Sarah og Ernie. Meðan tey eru ein túr í skóginum, renna tey á eina stóra og stinkandi veru.

Hon vísir seg at vera deyð, og tey hava ábyrgdina av henni, tí tey hava rent á hana. Familjan tekur veruna heima við sær, og tey gerast sera bilsin, tá tey varnast, at veran enn er á lívi. Síðan henda dagin hevur einki verið sum vant hjá familjuni Henderson.

VIÐMERKING

Skal løgtingið ikki aftur lóggeva mannamun, má uppskotið til nýggja dagpengalóg broytast

Hans Pauli Strøm,
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Fyri skjótt 3 árum síðani varð arbeiðsbólkur settur at fyrireika broytingar í lógini um dagpening vegna sjúku og barnsburð. Í bólkinum vóru 2 umboð fyri arbeiðsmarknaðin (Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag) og 2 umboð úr landsfyrisitingini. Fyri einum ári síðani var nevndin liðug og handaði landsstýrismanninum sítt álit við einum uppskotið til nýggja dagpengalóg. Í einum føri vóru partarnir ikki samdir, nevnliga um hvør skuldu gjalda teir tveir fyrstu karensdagarnar, sum annars semja var um at taka av. Tí vóru tvey alternativ sett opin at velja ímillum: Tey bæði umboðini fyri arbeiðsmarknaðin vóru samd um at landskassin skuldi gjalda, júst so sum hann gjaldar fyri tey alment fastløntu. Hini bæði sum umboðaðu landsfyrisitingina hildu, at arbeiðsgevararnir skuldu gjalda.

Tímalønt framvegis álagd 1 karensdag
Nústani, næstan eitt heilt ár seinni, kemur so uppskotið, munandi broytt av fyrisitingini, til viðgerðar í tinginum. Ein høvuðsbroyting er, at nú snýr tað seg bara um dagpening vegna sjúku, tí at barnsburðarskipanin er tikin burturúr og verður gjørd til lóg fyri seg. Hinn høvuðsbroytingin er, at av teimum báðum karensdøgunum verður annar tikin burtur og settur til landskassan at gjalda. Tey sum eru fevnd av hesi lógini – tímaløntir løntakarar, sjómenn, útróðrarmenn og sjálvstøðugt vinnurekandi sum ikki hava onnur í arbeiði – skulu so framvegis hava 1 karensdag eftir. Tvs hesi skulu eftir uppskotinum framvegis - sum tey einastu á arbeiðsmarknaðinum - sjálvi gjalda sín fyrsta sjúkadag. Fyri at sleppa undan at taka remsuna av hesum starvsbólkum uppísamanaftur, verða tey øll í hesi grein nevnd "tímalønt".

Løgtingið staðfesti mannamun á Ólavsøku 1999
Høvuðstrupulleikin í dagpengalógini hevur verið teir tveir karensdagarnar, og hava vit frá andstøðuni fleiri ferðir roynt at fingið teir tiknar av. Seinast var á sumri 1999, tá eitt samt løgting setti karensdagarnar hjá fastløntum úr gildi, men samgonguflokkarnir samstundis feldu uppskotið hjá andstøðuni, um eisini at seta karensdagarnar hjá tímalønturnum úr gildi. Tvs. at samgongumeirilutin hevur við atkvøðugreiðslu í løgtinginum ásett, at her á landi skal gerast mannamunur, og hetta hevur verið stoðan nú síðani 1. juli 1999: meðan alment o.o. fastlønt starvsfólk hava rætt til fulla løn frá og við 1. sjúkadegi, so skulu tímalønt sjálvi bera alla mista inntøku tveir teir fyrstu sjúkadagarnar og har aftaná bara fáa eitt skert og avmarkað endurgjald.

Nú er so endiliga uppskotið komið, og tingið fær hervið høvið til at rætta nakað upp av tí skaða, sum gjørdur er. Fáa vit bøtt um lógaruppskotið á fleiri økjum, men fyrst og fremst rættað tað ljótað brekið, at tímalønt skulu framvegis hava ein karensdag, so kann hetta blíva eitt stórt arbeiðsmarknaðarpolitiskt framstig.

Løgtingið má ikki aftur lóggeva mannamun!
Sjálvandi er tað frægari, at tímalønt nú ikki longur skulu hava 2 men bert 1 karensdag. Men tað skerst ikki burtur, at tað er ein vanærilig framferð, um løgtingið nú aftur skal lóggeva ein mannamun: kann løgtingið koma sær við lóg at diskriminera, at áseta mun millum tey rættindi, sum ymiskir starvsbólkar skulu hava á arbeiðsmarknaðinum ? Hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast. Vit kunnu sjálvandi vísa til javnrættindi, mannarættindi og grundlóg. Men okkum nýtist ikki at fara so langt. Tað er eisini sagt stutt og greitt í álitinum hjá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi uppruna-liga uppskotið, at mannamunur skuldi ikki gerast:

"Bólkurin er av tí fatan, at høvuðsendamálið við lógini er at veita endurgjald fyri mista inntøku, eisini 2 teir fyrstu dagarnar. Havast skal eisini í huga, at starvsfólk á almenna arbeiðsmarknaðinum við lóg eru frítikin frá "karensdøgunum", og tí er tað ógviliga órættvíst, at arbeiðsfólkini á privata arbeiðsmarknaðinum framvegis ikki skulu fáa endurgoldið fyri mista inntøku tveir teir fyrstu dagarnar".

Løgtingið skal eisini ansa sær í hesum málið. Føroya Arbeiðarafelag sigur í sínum ummæli av uppskotinum, at "vit meta tað eisini vera brot á vanliga galdandi regluna um líka viðgerð av borgarum landsins", um løgtingið samtykkir uppskotið hjá landsstýrinum og lóggevir mismun á ymiskum starvsbólkum. Og tað er álvarsligt tá felagið sigur, at "vit ætla at royna henda spurningin í rættinum".

Arbeiðsgevarar mugu taka fyrsta sjúkadagin
Lógaruppskotið er í løtuni í løgtingsins trivnaðarnevnd. Vónandi kann har fáast meiriluti fyri at gera eitt broytingaruppskot, sum áleggur arbeiðsgevarum at gjalda fyrsta sjúkadagin. Undir 1. viðgerð av málinum vístu fleiri av flokkunum hesum positivan áhuga. Í tí sambandi vísti landsstýriskonan í almannamálum, Helena D. á Neystabø, eisini á møguleikan fyri at gera eina inngjaldsskipan fyri privatar arbeiðsgevarar, so teir við einum inngjaldið uppá 0,2% av útgoldnu lønini kunnu fíggja tær uml. 6 mió.kr. um árið, sum fyrsti sjúkadagur er mettur at kosta. Almannastovan kann framvegis umsita skipanina, so tað slepst undan óneyðugari eyka umsiting, tvs. Almannastovan útroknar og leggur út fyri 1. sjúkadag, men krevur gjaldið innaftur frá arbeiðsgevarunum.

Dagpeningaupphæddin ger eisini mannamun
Dagpeningaupphæddin skal útroknast eftir miðalinntøkuni eitt undanfarið tíðarskeið. Men eftir uppskotinum skal verða eitt loft yvir hesi upphædd: uttan mun til hvussu stór inntøkan hevur verið, so kann dagpengaupphæddin í mesta lagið verða 80% av eini ófaklærdari arbeiðaraløn, tvs. einar 11.600 kr. Hví hetta loftið skal vera, er ilt at skilja og enn verri at góðtaka. Tí táið nú øll fastlønt starvsfólk og tænastumenn – uttan at nakar setir spurnartekin við tað – eiga rætt til fulla og óskerda løn undir sjúku – uttan mun til hvussu høg løn teirra er – hví skal so ein tímalønntur arbeiðari, handverkari, sjómaður ella útróðrararmaður hava eitt so lágt loft á tí endurgjaldi, sum hann kann fáa, svarandi til 4/5 av eini ófaklærdari arbeiðaraløn ? Hvat er argumentið fyri hesum mannamuni ? Heldur nakar tað vera bíligari hjá einum tímalønntum forsyrgjara at vera sjúkur enn hjá einum fastløntum ? Hevur ein tímalønntur ikki sama tørv á fullum endurgjaldi, sum tann fastlønti? Henda ótrúliga smáligheit eigur ikki at góðtakast, og tí eigur loftið at lyftast munandi ella heilt takast burtur.

Dagpeningatíðarskeiðið er ov stutt
Táið lógaruppskotið ásetir, at tímalønt kunnu fáa dagpening í upp til 20 vikur, so er ongin grundgeving fyri, hví skeiðið skal avmarkast til júst 20 vikur. Í øðrum londum er skeiðið munandi longri – t.d. er tað 1 ár í Danmark. Og í okkara komandi lóg um dagpening vegna barnsburð er skeiðið 26 vikur. Tað rætta eigur sjálvandi at verða, at sjúkadagpening eigur tú so longi tú ert sjúkur. Ert tú blivin varandi sjúkur, eigur tú sjálvandi at koma undir aðrar skipanir, men tað eigur so at vera eftir læknaligari avgerð. Ella sum enn betri sagt av Føroya Arbeiðarafelag í tess ummæli, at "dagpeningaveitingin eigur at latast so longi løntakarin er sjúkur ella til serlæknafrágreiðing staðfestur, at viðkomandi ikki verður arbeiðsførur aftur".

Tí eru hendan ætlaða avmarkingin til 20 vikur aftur eitt dømi um hesa ótrúligu smáligheitina og gírigheitina - eins og tann skerda endurgjaldsupphæddin og ætlanin at varðveita ein karensdag – sum samfelagsins ovastu sýna, tá tað ræður um tey tímaløntu.

Tað er í hesum sambandi vert at minnast til, at júst tann parturin av arbeiðsfólki, sum henda lógin fevnir um, oftast eru tey við teim vánaligastu arbeiðsumstøðunum, tí strævnasta og ótýdligasta og ofta óstøðuga arbeiðinum, og við teim lægstu lønunum. Tí er tað skammiligt, at samfelagsins politisku myndugleikar harumframt skulu skipa lóggávuna so, at hon veitir júst hesum tær vánaligastu sømdirnar.

Táið børn eru sjúk
Eitt annað dømi um henda støðuga mismun, sum verður framdur, er tá tað snýr seg um dagpening í smb. við sjúku hjá børnum. Tann ásetingin, sum nú er komin inn í lógina, gevur arbeiðsfólki ein møguleika – men ein ómetaliga skerdan møguleika – at fáa dagpening at verða heima hjá sjúkum barni. Sum landsstýrið sigur í viðmerkingunum: "Ætlanin er ikki, at hetta skal vera ein generel skipan, har tú fært endurgjald fyri at vera heima hjá sjúkum barni. Treytin er, at álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuna hjá tí sjúka, og at læknin metir, at tað er av alstórum týdningi, at persónurin er burtur frá arbeiði, fyri at vera um tann sjúka." Tvs. at tað skal altso snúgva seg um lív ella deyða hjá barninum – bert tá kanst tú sum vanligt arbeiðsfólk allernáðigst fáa dagpening at sleppa at vera heima hjá barninum.

Her er sanniliga munur á monnum og kvinnum, tá hugsað verður um, at almennu starvsfólkini og flestu onnur fastløntu eiga rætt til at kunna verða heima hjá sjúkum barni við fullari løn í upp til 10 dagar um árið, og eru tað fleiri børn undir 10 ár, so upp til 20 dagar. Og hetta uttan byrokratiskt kontrol og læknaváttanir. Men tað vanliga arbeiðsfólkið ? – nei har eru kostirnir ikki so mjúkir! Tað er nú ein løgin hugburður samfelagsins ovastu hava til teirra, sum taka tey tyngstu tøkini og hava tær ringastu umstøðurnar.

Hetta vóru bert nøkur fá, men kanska tey grefligastu lýtini við uppskotinum til nýggja dagpengalóg. Samantikið er nógv at bøta um og rætta upp í hesum lógaruppskoti. Møguleikin er har, men tað er í stóran mun upp til løgtingsins trivnaðarnevnd, har uppskotið í løtuni er til viðgerðar.

Opið bræv til Anfinn Kalsberg, løgmann og Eyðun Eltør, landsstýrismann

Føroya Javnaðarflokkur
14. februar 2001

Rættiligt kjak hevur nú tikið seg upp í donskum bløðum, serliga Ekstrablaðnum, um føroysku undirgrundina. Hví henda greinarað nú stingur seg upp, kunnu vit sjálvsagt hava okkara tankar um, men tað er rættiliga sannlíkt, at endamálið er at skaða viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Líkt er til, at henda greinarað hevur fingið danskar politikkarar at seta spurningar og krevja kanningar av avtaluni frá desember 1992 um ráevni í føroysku undirgrundini.

Men tað er sanniliga eisini líkt til, at bæði ávísir politikkarar og nú eisini embætisfólk her heima sáa iva um hesa avtalu og siga, at danskir myndugleikar kunnu taka málsøkið aftur, tí yvirvaldsrætturin er teirra.

Tað er sera umráðandi, at landsins myndugleikar nú staðiliga koma til orðanna og taka allan iva burtur um avtaluna frá 1992. Umráðandi er at fáa sligið fast, at henda avtala undir ongum umstøðum verður viðgjørd av nýggjum.

Hetta er eisini neyðugt, fyri at áhugin hjá oljufeløgum á Føroyaleiðini ikki verða fyri afturstigi.

Heitt verður tí á løgmann og landsstýrismannin í oljumálum at taka neyðugu stigini, sum rudda burtur allan iva um óskerda rætt føroyinga til ráevnini í undirgrundini, og at hesin rættur ikki kann takast frá okkum.

gult cyan magenta svart